VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

# Útbúgving skapar framburð

**-Ynski um menning og framburð býr í okkum menniskjum. Framburður er eitt mál, ið vit vanliga seta í samband við okkara dagliga yrki. Útbúgving gevur okkum dugnaskap, førleika og vitan, og styrkir og mennir okkara støði til framburð og til at náa høgum málum segði Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP, tá hann helt røðu í sambandi við prógvahandanina leygardagin**

PRÓGVAHANDAN/ RØÐA
*Hjarnar Djurhuus*

Ministers, Mr. Principals, honor students and guests. My speech to day is mainly to the students; therefore I will address me to the audience in Faroes.

Í 1992 varð telvingin lokin millum Danmark og Føroyar um undirgundina.

Í 1999 varð telvingin lokin millum Stóra Bretland og Føroyar um landgrundsmarkið.

Í februar 2000 varð fyrsta útbjóðingarumfar lýst. BP var eitt av oljufeløgunum, ið søkti og fekk leitiloyvi á føroyska landgrunninum. Umframt at binda seg til at gera ávísar seismiskar kanningar og at gera boringar, átók felagið sær eisini at nýta góðar 40 mill. kr. yvir eitt 6 ára tíðarskeið til førleikamenning av føroyskum virkjum og stovnum. Ein av mongu verkætlanunum, ið BP hevur stuðlað, síðani felagið fekk tillutað øki 004, er tann fjarlestur, sum Robert Gordon Universitetið stendur fyri í samstarvi við Føroya Handilsskúla

Hálvttriðja ár er nú liðið, síðani umboð fyri Robert Gordon Universitetið, Føroya Handilsskúla og BP vórðu samd um at fara undir Master-útbúgving í leiðslu og fyrisiting, skipað sum parttíðarundirvísing og fjarlestur. Ein áhugaverdur lestrarháttur, ið ikki fyrr var royndur her á landi. Ein lestrarháttur, sum í stóran mun gav føroyingum møguleika at luttaka, hvar í landinum tú enn búði.

Sjálvt um endaligt prógv kundi fáast bæði eftir fyrsta og annað lestrarár, so hava ikki færri enn 17 av teimum 21 næmingunum, ið byrjaðu, valt at skriva høvuðsritgerð at taka Master Degree.

Byrjan er vanliga trupul. Tað hevur verið trupult hjá Robert Gordon Universiteti at halda ávísar tíðarfreistir og onkrar misskiljingar hava eisini verið í sambandi við vegleiðing. Hetta hevur verið viðvirkandi til, at ikki allir næmingarnir fingu Master prógv handað í dag, men at nakrir mugu bíða í einar, tríggjar mánaðar.

17 næmingar hava fingið prógv handað í dag. Hetta er eitt stórt tal, tá hugsað verður um, hvussu møtumikið tað mangan má hava verið eftir stríðnan arbeiðsdag at skula seta seg í einar 2-3- tímar við uppgávum, og hetta á fremmandum máli.

Vit kunnu spyrja, hvat hava tit lesandi so fingið burtur úr lesnaðinum. Jú, tit hava fingið eina útbúgving, ið vónandi gevur núverandi starvi tykkara størri innihald og vónandi eisini gevur tykkum betri møguleikar at fáa røttu størvini í framtíðini. Tit hava betrað tykkara kunnleika í einum heimsmáli, enskum, tit hava betrað og styrkt tykkara førleika at leggja tykkara arbeiðið til rættis og at arbeiða innan fyri ávísar tíðarfreistir.



*Tey 17, sum fingu prógv handað leygardagin*

Hjá tilkomnum fólki, ið hava ognað sær eitt vist støði í lívinum, verður hetta standandi so leingi viðurskiftini standa við. Tá viðurskiftini broytast, kemur ein nýggj tíð.

Tit, sum í dag hava fingið tykkara prógv handað, hava verið við til at slóða fyri einum nýggjum lestrarhátti, og við tykkara úrslitum hevur væl verið slóðað. Men ikki bert hava tit slóðað fyri, tit hava eisini skrivað søgu, tí ongantí fyrr hava 10 føroyingar í senn fingið handað prógv á Master støði.

Samstarvið við Robert Gordon Universitetið hevur eisini verið við til at ment Føroya Handilsskúla sum undirvísingar stovn. Tann 13. mars 2003 varð samstarvsavtala undirskrivað millum Robert Gordon Universitetið og Føroya Handilsskúla, um økt samstarv. Robert Gordon Universitetið bant seg til at menna lærarar á Føroya Handilsskúla, so hesir sum frá leið kundu yvirtaka undirvísingina í sambandi við fjarlestur og soleiðis verða við til at lyfta handilsskúlan upp á eitt hægri støði.

Dagliga leiðslan á Handilsskúlanum hevði málvísar og ítøkiligar ætlanir um at menna Føroya Handilsskúla soleiðis, at hesin, sum frá leið, kom uppá handilsháskúla støði. Tað er neyðugt hjá einum skúla, eins og einum virki, at menna seg, um ein ikki skal gerast eftirbátur, at flyta seg og at laga seg eftir broyttum samfelagskrøvum. Vónandi verður kósin hildin til komið verður á mál, til gagns fyri Føroya Handilsskúla, næmingarnar og ikki minst fyri tað føroyska samfelagið.

Robert Gordon Universitetið er kent fyri at hava nógvar útlendingar sum lesandi. Í løtuni eru lesandi frá 146 ymiskum londum. Talið á føroyingum, ið lesa við universitetið, er so stórt, at vit liggja á einum sjeynda plássi.Verður eitt triðja hold byrjað, sum talan hevur verið um, koma Føroyar uppá eitt fimta pláss aftaná Bretland, Kina, India og Malaysia. So lestrarmynstrið í sambandi við hægri útbúgvingar tykist at broytast frá donskum til bretskar lærustovnar.

Vegna BP og Shell eri eg




*Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP fegnaðist í røðu síni um, at útbúgving við hesum tiltaki hevur fingið størri raðfesting í samfelagnum*
*Mynd Jan Müller*